# Hvar er tann fakliga vitanin í málinum um bústovnin í Pætursgøtu 3

PÆTUR NICLASEN



Eftir at ein hevur lisið og hoyrt um bústovnin í Pætursgøtu 3, ivast ein í førleikanum hjá teimum, sum koma við tilmælinum frá Nærverkinum.

Um ein kom við einum tilmæli um at flyta løgmansskrivstovuna í framsleiðsluhølið hjá Føroya Fiskavirking, tí har er pláss fyri tí, ella um ein kom við einum tilmæli um at lata neyt ganga í fólkaskúlanum, høvdu tey verði kveistrað burtur.

Hesi tilmæli høvdu yvirhøvur ikki verið viðgjørd. Tí tey eru ikki seriøs.

Líka lítið seriøst er tilmælið um at niðurleggja stovnin í Pætursgøtu 3 og lata búfólkini har búgva á stovni saman við evnaveikum fólki. Hvat hava fólk við Aspergers syndromi felags við evnaveikum fólki?

Onki.

Hettar vísir bert á manglandi fakliga vitan hjá teimum, sum eru komin við tilmælinum frá Nærverkinum. Har er tað onkur sum hevur uppiborið eina nøs. Ella eina sigar.

Eg eri ikki í móti sparingum og at trimma umsitingina, men lat allar broytingar byggja á fakliga undirbygdar grundgevingar, ikki bert fíggjarligar grundgevingar.

Lat endamálið við einari broyting verða eitt betri tilboð til brúkaran. Um ein so eisini kann spara pengar í hesari tilgongd, er tað ein vinn vinn støða.

# Nei – tað er ikki eg, ið sigi ósatt

RÓSA SAMUELSEN
landsstýriskvinna í almannamálum



**Illgitingar og misskiljingar grugga málið um tey trý búfólkini, sum um hálvantriðja mánað ætlandi verða flutt í annað sambýlið at búgva. Nærverk hevur leikt við opnum kortum og einki hevur verið dult í tilgongdini, sum enn má sigast at vera á einum byrjanarstigi**

Stór orrusta hevur tikið seg upp í samband við mál, har tríggir brúkarar í serforsorgini ætlandi verða fluttir á annan stovn tann 1. mai. Fjølmiðlar, politikarar og fakfelagsformenn hava serliga funnist at tilgongdini í málinum, og róð hevur verið framundir, at avgerðirnar eru tiknar á svartastu nátt og tilvitað lagt soleiðis til rættis, at eingin skuldi vita av nøkrum.

Hesum vil eg staðiliga vísa aftur. Fyri tað fyrsta verður flytingin ikki framd fyrr enn 1. mei, so enn eru vit í einari skipaðari tilgongd, sum skal tryggja, at skiftið verður gjørt so smidligt, sum yvirhøvur møguligt. Tað er tí ikki rætt, sum onkur hevur bent á, at starvsfólkini í Pætursgøtu fingu boðini seint. Tey fingu boðini fyri umleið trimum vikum síðani, og tað er væl at merkja tríggjar mánaðir áðrenn sjálv flytingin fer fram. Brúkarar og avvarðandi vóru kunnaði í seinastu viku – hálvantriðja mánað áðrenn brúkararnir eftir ætlan skulu flyta. At framstandandi fakfelagsformaður áhaldandi bendir á, at talan er um "tys-tys-strategiir" er í mínum hugaheimi sera óheppi og ókonstruktivt, tí tað elvir bert til ótryggleika millum brúkarar og avvarðandi.

**Málið í stuttum**
Málið kann í stuttum lýsast soleiðis: Vegna rationaliseringar eru ætlanir um at leggja tveir bústovnar undir Nærverkinum saman í ein bústovn frá 1. mai. Hetta merkir, at bústovnurin í Pætursgøtu, sum hevur havt tríggjar brúkarar, verður niðurlagdur. Trý av føstu starvsfólkunum fylgja við brúkarunum á nýggja bústovnin fyri at tryggja, at serkunnleikin ikki verður burtur. Nýggi bústovnurin er í trimum hæddum, og hølini verða innrættaði við atliti til, at teir íalt seks brúkararnir kunnu búleikast saman, men eisini hvør sær, um tørvur verður á tí. Hetta er alt lagt til rættis í tøttum samstarvi við starvsfólkini á bústovnunum báðum.

Í heila tikið hevur leiðslan í Nærverk og í Trivnaðartænastuni gjørt sera nógv burturúr at fyrireika flytingina og gera tilgongdina so smidliga sum gjørligt. Og tað er at gera teimum órætt, at siga, at avvarðandi partar ikki eru kunnaðir í tilgongdini. Fyri at sláa hetta fast við sjeytummaseymi endurgevi eg niðanfyri eina frágreiðing, sum Nærverkið hevur latið mær um málið.

**Fakta**
Tann 22. januar hevur Nærverki fund við felagið Javna um sparingar og eina viku seinni, tann 29. januar, verður sama evnið høvuðstema á fundi við Føroya Pedagogfelag. Har verður m.a. greitt frá, at ein stovnur við trimum búfólkum verður niðurlagdur, og at tey verða flutt í onnur sambýli. Hetta verður gjørt, tí tað kemur at raka so fáar brúkarar, sum møguligt. Hetta var ein almenn kunning, har nøvn á stovnum ikki vóru nevnd. Pedagogfelagið var eisini kunnað um onnur sparitiltøk.

Tann 26. januar verða leiðarin og varaleiðarin í Pætursgøtu kunnað um ætlaðu niðurlegging av Pætursgøtu. Dagin eftir verða leiðararnir í Trivnaðartænastuni kunnaðir á leiðarafundi um, at sparingar verða framdar. 28. januar verða starvsfólkini í Pætursgøtu kunnað um, at virksemi í Pætursgøtu verður niðurlagt.

10. februar er fyrireikandi fundur millum Nærverk og varaleiðara í Pætursgøtu og leiðara í nýggja bústovninum, um ymisk viðurskifti í samband við flytingina.

12. februar hevur Nærverk fund við starvsfólk og leiðarar á teimum báðum bústovnunum, ið skulu leggjast saman, um tilgongdina í samband við ætlaðu flytingina. Her undir um kunning til búfólk og avvarðandi. Seinni vóru starvsfólkini og hugdu eftir umstøðunum í nýggja bústovninum.

13. februar kunnaðu varaleiðari og starvsfólkini í Pætursgøtu búfólk og avvarðandi um ætlaðu flytingina

Í dag, 18. februar, fara starvsfólk í Pætursgøtu at hyggja nærri eftir umstøðunum. Eftir tað verður avrátt, hvussu tilgongdin við búfólkunum og teirra avvarðandi skal fara fram.

# Skulu funktiónir, sum náttúrliga hoyra heima í Klaksvík nú flytast til Suðuroyar?

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN
býráðslimur í Klaksvík



Læs grein í Sosialinum um, at verður hugskotið, sum fiskivinnumálaráðið arbeiðir við ført út í lívið, so verða umsitingarnar hjá Tjaldrinum og Magnusi Heinasyni fluttar til Suðuroyar og lagdar saman við Strandferðsluni.

Tað næsta, sum kemur fram í fjølmiðlunum er, at ein annar almennur stovnur (brúkaraumboð) skal setast á stovn í Suðuroynni. Eg unni væl suðringum henda stovn, tí støðan í Suðuroy er ikki góð.

Landsstýrismenninir Jacob Vestergaard og Jóhan Dahl skulu hava rós fyri, at teir kempa fyri oynni, sum stóð saman um at velja teir á ting.

Men tá tað so er sagt, vænti eg samstundis, at okkara politisku umboð, sum klaksvíkingar saman við norðoyingum stóðu saman um at velja á ting, eisini kempa fyri, at Klaksvíkin skal verða ein framtíðar býur við nógvum møguleikum.

Júst vaktar- og bjargingartænastan er dømi um ein stovn, sum náttúrliga hoyrir heima í Klaksvík. Eftir mínum tykki skal alt tað, sum hevur nakað við sjó- og fiskivinnu at gera, og eisini útbúgvingar innan hetta øki, flytast til Klaksvíkar.

Eg vil enn einaferð spyrja rætta viðkomandi, hví onki hendir við trygdarmiðstøðini í Klaksvík.

Fyri nøkrum árum síðani valdi Klaksvíkin ikki at bjóða seg fram sum oljuútgerðarhavn, tí vit valdu at satsa upp á sjó- og fiskivinnuna. Táverandi býráð valdi ikki at kappast við Runavík, Tvøroyri og Tórshavn um hetta.

Innan skúlaøkið eru serdeilis nógvir møguleikar í Klaksvíkini. Vit hava ein vælútbygdan Tekniska Skúla. Og við nakað av nýgerð kunnu vit hýsa øllum tekniskum útbúgvingum í Føroyum á einum tekniskum depli.

Og her hugsi eg serliga um úttalilsi hjá Helenu Dam á Neystabø um, at nú vegakervið er útbygt í Føroyum so nógv og fyri so høgar upphæddir hesi mongu seinastu árini, at tíðin var komin har til, at vit ikki skulu hava dupultfunktiónir. Og júst hettar er ein gyltur møguleiki at hava allar tær teknisku útbúgvingarnar undir einum taki í Klaksvík.

Í kjalavørrinum av javnstøðupolitikkinum havi eg hug at varpa ljós á javnstøðuna oyggjanna millum. Um sentraliseringin heldur fram í sama líki, sum hesi seinastu mongu árini, verður endin tann, at tað bert verða havnarfólk, sum fáa familjuna/børnini aftur til sín heimbý eftir lokna útbúgving í øðrum londum, av tí einklu orsøk, at onki arbeiði er til útbúnu fólkini uttan fyri Havnina.

Tíðin er komin hartil nú, at landspolitikarnir eru noyddir til at melda út, hvat teir vilja við Klaksvíkini. Skal Klaksvíkin verða ein blomstrandi býur við møguleikum, ella skal sentraliseringin halda fram.

Løtan er komin hartil, at tað hastar at gera íløgur í býin. Eftir at Kósavirkið varð latið aftur, eru 200 - 250 fólk í býnum vorðin arbeiðsleys. Handlar og aðrar vinnur í býnum rópa varskó, tí umsetningurin er so nógv minkaður. Fleiri arbeiðsfólk eru send heim á ymsum arbeiðsplássum, tí ringvirkningurin er vorðin so stórur. Her má og skal okkurt gerast.

# Aftursvar til Rósu Samuelsen: Kunnaði – men ikki hoyrd

JARVIN FEILBERG HANSEN
Formaður í Føroya pedagogfelag



Tað er rætt, at Føroya pedagogfelag hevði ein fund við Trivnaðartænastuna um ætlaðu sparingarnar. Greitt var frá, at onkur stovnur skuldi niðurleggjast og at okkurt virksemi bleiv broytt. Starvsfólk og leiðsla á stovninum eru vorðin kunnaði um avgerðina, men ikki hoyrd – og tað er ein stórur munur á hesum fyribrygdum, at verða hoyrdur og verða kunnaður.

Viðvíkjandi einari hoyring, so skal ein slík hoyring tryggja:

- at persónurin ella felagið, sum hoyrt verður, fær ítøkjuliga at vita hvørja avgerð myndugleikin ætlar at taka,
- at persónurin/felagið, sum hoyrt verður fær høvi at koma við sínum viðmerkingum áðrenn nøkur avgerð verður tikin.
- at viðmerkingarnar hjá hoyrda persóninum/felagnum verður ein partur av avgerðargrundarlagnum hjá myndugleikanum.

Hendan hoyring kann so verða við til at broyta avgerðina hjá tí parti, sum ætlar at fremja avgerðina í verki.

At *kunna* starvsfólk um eina avgerð er so nakað heilt annað. Tá er avgerðin tikin og hon stendur ikki til at vika.

At Trivnaðartænastan eisini hevur fingið spariknívin at merkja, fekk Føroya pedagogfelag eisini at vita beinanvegin, men felagið var ikki við í tilgongdini um **hvussu** sparingarnar fóru at verða framdar. Hetta er tað, eg havi at finnast at. Um starvsfólk og felag vóru við í hesari hoyringsgongdini, hevði úrslitið óivað verið øðrvísi – allir partar høvdu verið hoyrdir og ikki bert kunnaðir.

Er tað soleiðis almennu myndugleikarnir velja at fremja sparingar í verki?